VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.10.2022 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jóhannus Hansen, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke

Varalimir: Jóhannus Hansen

Ikki til staðar: Jens Gaardlykke

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 11/22 | 22/00039-10 | Mál beind í nevnd 8/22 | 2 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 51/22 | 22/00413-4 | Umsókn um sundurbýti og marknaumskipan millum 75b og 220 í Sandavági til ummælis | 3 |
| 52/22 | 22/00467-2 | Sundurbýti millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis | 4 |
| 53/22 | 22/00501-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 167d í miðvági, til ummælis | 6 |
| 54/22 | 22/00526-9 | Tilboð um samstarvsavtalu millum Vága kommunu og MEA - Húsið fyri familjumenning | 7 |

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 11/22 Mál beind í nevnd 8/22

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.10.2022 | 11/22 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 25. oktober 2022:**

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 51/22 Umsókn um sundurbýti og marknaumskipan millum 75b og 220 í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.10.2022 | 55/22 |
| 2 Býráðið | 25.10.2022 | 51/22 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti og marknaumskipan, millum 75b og 220 í Sandavági, til ummælis.

Søkt verður um sundurbýtan av matr. nr. 220. Talan er um at býta eitt traðarstykki úti á Trøð frá grundstykkinum á Steigarbrekku 8, so húsini kunnu seljast, meðan umsøkjarin hevur trøðna eftir.

Eisini verður søkt um at marknaumskipa millum matr. nr. 75b og 220, har matrikul 220 fær 4 metrar norðeftir.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Umsitingin viðmælir sundurbýti.

Í samband við marknaumskipan er talan um tveir smáar matriklar, har hús longu standa á, og við at gera eftir umsóknini fær matr. 220 pláss til bil á egnum matrikli.

Umsitingin viðmælur marknaumskipanina.

**Tekniska nevnd 13. oktober 2022:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. oktober 2022:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 52/22 Sundurbýti millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2022 | 51/22 |
| 2 Býráðið | 27.09.2022 | 49/22 |
| 3 Tekniska nevnd | 13.10.2022 | 57/22 |
| 4 Býráðið | 25.10.2022 | 52/22 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti til samanleggin millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis.

Ætlanin er at býta niðasta partin av matr. nr. 34a, á Ovastuhjallar 10 frá og leggja tað saman við matr. nr. 293f, Miðhjallar 13.

Matr. nr. 34a verður tá 1497 $m^2$ og samanlagdi matrikulin verður 891 $m^2$.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Tekniski leiðarin mælir frá at viðmæla umsóknini, tí grundstykkini hava góðkendar adressur og eru í góðkendari útstykkingarætlan.

**Tekniska nevnd 15. september 2022:**

Tekniska nevnd mælir frá.

**Býráðið 27. september 2022:**

Samtykt at beina málið aftur í nevnd.

**Tekniska nevnd 13. oktober 2022:**

2 nevndarlimir viðmæla og 2 frámæla.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**<u>Býráðið 25. oktober 2022:</u>**

Rósa Samuelsen luttók ikki í viðgerini av hesum málið.

Meirilutin er viðmælir.

Minnilutin, sum er Dagbjørn Hansen, Jónhard Selfoss og Jóanis Albert Nielsen, frámælir.

Formansváttan:_____________

# 53/22 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 167d í miðvági, til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.10.2022 | 59/22 |
| 2 Býráðið | 25.10.2022 | 53/22 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr. nr. 167d í Miðvági, til ummælis.

Talan er um at yvirtaka vegin, ið er atkomuvegur til Húsanesveg 13 og 15, og matr. nr. 167d. Býráðið samtykti tann 19.04.2022 at yvirtaka vegin.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Bára hevur skriva á umsóknina, at hon skal gjalda sundurbýti. Tað rætta er, at kommunan skal gjalda fyri sundurbýti, og verður tað viðmerkt, tá ummæli verður sent aftur til Umhvørvisstovuna.

**Tekniska nevnd 13. oktober 2022:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. oktober 2022:**

Viðmælt.

Formansváttan:

# 54/22 Tilboð um samstarvsavtalu millum Vága kommunu og MEA - Húsið fyri familjumenning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 70/22 |
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 10.10.2022 | 60/22 |
| 2 Býráðið | 25.10.2022 | 54/22 |

**Málslýsing:**
Borgarstjórin ynskir at Mentanar og trivnaðarnevndin tekur støðu til um Vága kommuna tekur av tilboði um samstarvsavtalu við MEA – húsið fyri familjumenning.

Avtalan fevnir um familjuráðgeving, foreldraskeið til foreldur, sum eru farin hvør til sítt, umframt par-skeið til foreldur, sum hava børn við serligum tørvi.

Fyri tað árliga gjaldið frá Vága kommunu bindur MEA seg til at skipa fyri hesum árliga:
• Øll foreldrapør í kommununi, sum hava børn við tørvi, kunnu tekna seg til PREP skeið ókeypis.
• Øll foreldrapør/barnaverndartænastan í kommununi, kunnu tekna seg til KIFF skeið ókeypis.
•Allar familjur í kommununi fáa 5 tímar ókeypis familjuráðgeving
• At hava tætt samstarv við barna- og ungdómsdeildina hjá kommununi

Vága kommuna vísir á hølir og ber møguligan kostna av leigu til hølir. MEA ber kostnaðin av møguligum kosti og skeiðstilfari.

Tal og samanseting av árligum tiltøkum/tænastum í/til kommununa verður eftirmett og ásett á einum árligum fundi millum MEA og kommununa í apríl mánað, fyrstu ferð í apríl 2023.
Árliga gjaldið er ásett til kr. 30 pr. borgara í kommununi um árið, og ásett eftir fólkatalinum 1. januar í árinum avtalan er undirskrivað. Fyri kommununa verður kostnaðurin uml. 68.400kr í 2023.

Avtalan er bindandi í 3 ár, og kemur í gildi 1. januar 2023 og heldur fram í 3 ár, til 31. desember 2025. Avtalan millum Vága kommunu og MEA verður eitt víðkað tilboð til borgarar í Vága kommunu, sum eisini eru fevndir av avtaluni millum Almannamálaráðið og MEA, har øll pør, ið gerast foreldur fyri fyrstu ferð, fáa ókeypis par-skeið.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 10. oktober 2022:**

Meirilutin mælir til at taka av tilboðnum frá MEA. Mælt verður til at leggja afturat avtaluni undirvísing av starvsfólki á stovnum og skúla. Mælt verður til at endurskoða avtaluna um 1 ár.

Formansváttan:________

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:**
Mælt verður til at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 25. oktober 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 18.40

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jóhannus Hansen

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:__________



